**Avtala millum Danmark og Føroyar**

Í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar skal vera galdandi sum ískoyti vísandi til Sáttmála frá 23. september 1996 millum Norðurlond at sleppa undan, at inntøku- og ognarskattir verða tvískattaðir:

Grein 1

Hóast reglurnar í grein 15 og grein 21 skal í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark vera galdandi:

Samsýning fyri starv umborð á føroyskum skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, ella donskum skipum, skrásett í Donsku Altjóða Skipaskránni, kann bert verða skattað í tí partinum av ríkinum, har skipið hevur tjóðarprógv. Henda áseting verður einans nýtt, um arbeiði verður útint umborð á skipi, ið verður nýtt til endamál, sum lúka treytirnar fyri skattalækking eftir bæði føroyskum reglum fyri arbeiði umborð á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, eins og eftir donskum reglum fyri arbeiði umborð á skipum, skrásett í Donsku Altjóða Skipaskránni. Tá ið hesar reglur verða nýttar, verða fremmand skip, sum ein persónur heimahoyrandi í Føroyum ella í Danmark leigar eftir sonevndum bareboat-treytum, javnmett við føroysk skip, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, ella donsk skip, skrásett í Donsku Altjóða Skipaskránni. Grein 26, stk. 2 er ikki galdandi fyri samsýning, ið er fevnd av hesi grein.

Grein 2

Henda avtala kemur í gildi tríatiunda dagin eftir tann dag, tá báðir partar hava kunnað hvønn annan um, at avtalan er góðkend.

Avtalan hevur virknað fyri inntøkuskatt, sum er álíknaður fyri skattaár, ið byrja 1. januar 2005 ella seinni.

Ein partur kann siga avtaluna upp við skrivliga at boða hinum partinum frá hesum í seinasta lagi 30. juni í einum álmanakkaári. Tá so er, missir avtalan gildi fyri inntøkuskattir, sum verða álíknaðir fyri skattaár, sum byrja 1. januar í tí álmanakkaári, sum kemur aftaná tað árið, avtalan er uppsøgd, ella seinni.

Til at vátta hetta, hava undirritaðu undirskrivað hesa avtalu.

Skrivað á Argjum, tann 10. august 2005 í tveimum eintøkum á donskum og á føroyskum, sum øll hava sama gildi.

Fyri Danmark / Fyri Føroyar

Kristian Jensen (sign.) / Bárður Nielsen (sign.)